# Góð ráð

**Fyribyrg oljuleka, áðrenn tað kostar tær og náttúruni dýrt**

**Tú hevur longu ein oljutanga:**

- Kanna tín oljutanga alt fyri eitt. Umhugsa at fáa ein serfrøðing at kanna tangan, rørleiðingar og oljufýr.
- Kanna, um tú hevur eina trygging, sum fatar um skaða á tíni hús frá egnum oljutanga ella frá olju úr húsi í grannalagnum.
- Er oljunýtslan óvanliga høg ella hækkar hon brádliga munandi, eigur tú at umhugsa at kanna oljutangan.
- Um húsini eru keypt frá øðrum, tryggja tær so allar neyðugar upplýsingar frá fyrra eigaranum um, hvussu oljutangin er settur upp ella lagdur í jørðina, umframt vørulýsing og framleiðsluár.

**Skalt tú hava nýggjan oljutanga:**

- Tryggja tær, at nýggi tangin er sniðgóðkendur og at góðkenningarmerki er á tanganum. Eisini skal ein vørulýsing við framleiðsluári vera tøk. Minst til at goyma hana.
- Umráðandi er, at tangin liggur væl í lendinum, í sandi, so skaði ikki kemur á tangan. Fá tí altíð ein serfrøðing at góðkenna arbeiðið, áðrenn tangin verður tyrvdur.
- Kanna, um tú hevur eina trygging, sum fatar um skaða á tíni hús frá egnum oljutanga ella frá olju úr húsi í grannalagnum.
- Endurnýt ongantíð ein brúktan jørðtanga og legg ongantíð ein oljutanga í jørðina, ið ikki er egnaður til endamálið.

## Ert tú í iva?



**Ring til Snarskivuna**
**Tel. 30 20 10**

ella les meira á torshavn.fo

sansir.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Postsmoga 32
110 Tórshavn
Tel 30 20 10
Fax 30 20 11
torshavn@torshavn.fo
www.torshavn.fo

Mánadag - hósdag 9-16
Fríggjadag 9-15

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Lekur oljutangin?

Tað kunnu gerast dýrir dropar





# Kanna oljutangan

**– áðrenn tað kostar tær og náttúruni dýrt**

Oljutangar, ið fara at leka, eru ikki bara ein vandi fyri okkara dýrabara umhvørvi. Tað kunnu gerast dýrir dropar fyri teg sum húsaeigara, um tú ikki tekur hetta í álvara.

At skifta oljutangan út í rættari tíð er ein munandi minni útreiðsla í mun til kostnaðin og ta umfatandi dálking, ið ein óvæntaður leki kann hava við sær.

Ofta sæst oljan ikki aftur, men við tíðini gerst dálkingin so umfatandi, at hon kann luktast – eisini inni í húsum nærindis dálkingini.

Og tá fáa bæði tú – og kanska eisini grannarnir – ein trupulleika, ið kann gerast sera umfatandi og dýrur.

Tí ræður um at fyribyrgja í góðari tíð!

# Orsøkir til oljudálking

**Vanligastu orsøkirnar til óhapp við dálking frá oljutangum eru:**

- Ov gamlir, niðurgrivnir stáltangar, ið ofta ikki eru merktir við framleiðsluári.
- Gomul rør frá oljufýri til oljutanga verða ikki tikin burtur, og tí stendst ofta leki frá teimum.
- Eingin alarmur er, sum ávarar ímóti, at ov nógv olja verður fylt á oljutangan.
- Tangin stendur ikki rætt ella er ikki lagdur rætt í lendið.
- Skeiv avriggan av oljutanga. Oljan eigur at verða tømd úr tanganum og tangin fyltur við sandi ella burturbeindur. Umráðandi er, at áfylling og útlufting verða tiknar burtur.

**Oljutangar frá 1980´unum ella eldri eru í størsta vandabólkinum fyri umfatandi oljudálking!**

# Er illgruni um oljuleka?

Er oljutangin gamal ella í ringum standi, eigur hann at skiftast út sum skjótast.

Kemur olja í undirlendið, er umráðandi, at tangin verður tømdur og tikin úr nýtslu alt fyri eitt. Umráðandi er eisini, at lendið verður grivið upp til tess at forða fyri, at oljan spjaðist í lendinum.

Hendir hetta, kann oljan leggja seg undir sethúsagrundina hjá tær og hjá grannanum. Hetta kann elva til oljulukt í húsinum, og tað kann vera torført og sera kostnaðarmikið at umvæla.

**Tekin um oljuleka:**

- Tú nýtir óvanliga nógva olju, ella brádliga hækkar nýtslan munandi
- Tað luktar av olju uttanfyri ella inni í húsunum hjá tær ella grannanum
- Sjónligir oljublettir eru at síggja í lendinum og til dømis í veitum

# Livitíð

Niðanfyri sæst ein talva yvir vegleiðandi livitíð hjá oljutangum

| STAÐSETING | TANGA SLAG | TÆRINGS-VERJA INNAN | LIVITÍÐ (ÁR SÍÐANI FRAMLEIÐSLUÁR) |
|---|---|---|---|
| YVIR JØRÐ | Stáltangi | Nei | 30 ár |
| | Stáltangi | Ja | 40 ár |
| | Plasttangi | Nei (einkultveggjaður) | 25 ár |
| | Plasttangi | Nei (dupultveggjaður) | 40 ár |
| NIÐURGRIVIN | Stáltangi | Nei | 40 ár |
| | Glastrevjuklæddur | Ja | 50 ár |
| | Plasttangi | Nei | 45 ár |



Kelda: Olietankbekendtgørelsen 2010, Miljøstyrelsen